# Bilar í Vágum í 80 ár

**Vit prenta í dag annan part av Bilasøguni í Vágum, sum Einar Petersen, sáli, hevur skrivað til Bilasøguna, sum Føroya Ellisakfør seinni fer at geva út í bók**





*Thorstein Jørgensen við tiltiknu »Bremsi Ginu«*

## Bilasøgan í Vágum, annar partur

*Einar Petersen*

Aðrir bilar í tíðarskeiðnum 1920'unum – 1930'unum:

Zackaris Niclasen í Sørvági keypur í juli 1928 ein Chevrolet persónvagn - sama mánað og ár sum Enok og Rudolf keypa teirra lastbil, sum Rudolf seinni ger skiftilast á.

Partafelagi »Hamarsheld« í Sandavági keypir í oktobur 1928 ein Chevrolet lastbil. Nakrir av monnunum í hesum felag eru: Danial Petur Nielsen, synir hansara Zakarias Nielsen, Tummas Nielsen og Eliesar Thomassen (1871-1960) – aðrir vóru eisini uppií. Tummas Nielsen gjørdist mest sum fastur bilførari.

Zacharias Nielsen á Vatnsoyrum keypir í oktober 1932 ein Ford – lastbilur við skiftilast.

Hans Ellefsen, Miðvágur: Ein Ford lastvagn juli 1933.

N. Niclasen, Sørvágur: Ein Ford lastvagn juni 1933.

Hans Fredrik Jacobsen, Sørvágur: Ein Ford persónvogn mai 1934.

Í juni 1934 fær Hjarvil Rasmussen í Sørvági sær ein Chevrolet persónbil og í september 1936 keypir hann enn ein bil – ein Ford lastvagn. Vit skula venda aftur til Hjarvil og bilar hansara seinni í frásøgnini – saman við Henry Davidsen og Finn Joensen hoyrir hann til millum navnframastu bilmenn í oynni!

Á myndini niðanfyri sæst Chevroleturin koyra eftir »Blindtarminun« í Sørvági - tá á døgum var hesin vegur bert ein moldgøta.

Daniel Olsen í Sandavági keypir eisini ein Chevrolet lastbil, tað ger hann í apríl 1936.

Í juli 35 innflýtur partafelagið N. Niclasen tveir bilar úr Onglandi, annar er ein Ford lastbilur, hin ein Ford persónbilur. Teir kostaðu 7000 krónur tilsamans! Tveytúsund fyri lastbilin, fimmtúsund fyri persónbilin. Hesin seinni var ein Ford-V 8 hevði átta cylindarar fýra hvørju megin. Umframt brøðurnar Danjal og Edvard Niclasen – tann seinast nevndi stendur sum innflytari av bilinum – plagdi Henry Davidsen at koyra persónbilin, Henry er seinni kendur sum busførari her vestri. Lastbilin plagdi Elias Rasmussen – Víka Lias og viðhvørt sonurin Jens hjá Víka Liasi at koyra.

Vanligt var tá á døgum, at rópa persónbilar »lux-bilar«, og Ford-V8arin bar sanniliga hetta heitið av røttum! Eisini í dag hevði hann verið mettur at verða marglætisakfar: Pláta, ið kundi skjótast fyri, var millum fram og baksetrið og gardinur at draga fyri. Fólkið ella fólkini á baksetrinun kundu so samskifta við bilføraran gjøgnum eitt »talurør«. Harumframt kundu gardinur dragas fyri síðurútarnar aftan og bakrútin. Eisini var bilurin útgjørdur við radiolurti, og bleiv tískil kallaður »Radio-bilurin«. Men, tað var bara um kvøldið og náttina at nakað hoyrdist í radio-lurtinun.

Tað sigst, at hin skemtingarsami og hittinorðaði miðvingurin Jóannes Joensen, Oyra-Jóannes, einaferð varð komin í land av skipi ì Sørvági. Striltið gekst at fáa fart yvir um Vatn, hettar til Niclas Niclasen beyð onkrum at koyra Jóannes til hús við »Radio-bilinun«. Jóannes bleiv so hugtikin av at verða koyrdur heim í »lux-bili«, at hann í langa tíð aftaná ikki kundi tosa um annað enn hesa stórhending! Og nú er »luxbilur« í nærum hvørjum húsi í landinun! Ja, mangt umskiftis á mansins ævi!

### Vegirnir í Vágum

Áðrenn vit fara undir at siga frá um akfør í fýratiárunum og hareftir, skulu vit nema við, hvussu vegakervið hevur ment seg síðan fyrsti bilur kom í oynna.

Brúgvin um Sjatlá í Vatnsoyrum var bygd í 1924, tá bleiv koyrandi til Sørvágs. Fram til 1927 var bara koyrandi til Haraldsatrøð ovaliga í bygdini, tað árið bleiv vegurin longdur so, koyrandi var út á bryggjuna í Sørvági. Vegurin á Fútaklett kom í 1930. Bretar styrktu og asfalteraðu verandi vegakervið og bygdu flogvøllin undir krígnum. Vegurin til Bíggjar var liðugur so seint sum í 1953. Vegurin á Oyrargjógv var liðugur í 1967. Í 1977 varð farið undir at umleggja vegin úr Vatnsoyrum til flogvøllin og Sørvágs, hetta arbeiðið var liðugt í 1990. Samlaða vegalongdin í Vágum er í dag 25 km.

### Bilar í 40 - 50 - árunum

Í 1942 koma við stuttum millumbili tríggir persónbilar úr Onglandi. Teir verða fluttir á Sørvág við sluppuni »Skarpheðini«. Teir bilarnir vóru: Ein Buick til Hjarvil Rasmussen, ein Austin og ein lítil Morris til pf. N. Niclasen.

Søgan hjá hesum akførum er hendan:

Hjarvil nýtti Buickin sum hýruvagn. Við hvørt plagdi Petur Petersen, »Pedda« navnframi fótbóltsmálmaðurin hjá sørvingum at koyra Buickin.

Tann, ið skrivar hesar reglur, minnist Buickin avheinta onkran, sum hevði leigað hann í grannalagnum har, eg búgvi - hetta man hava verið í 1947, tá havi eg verið átta ára gamal. Ta ferðina koyrdi Pedda.

Buickurin var fyri einum óhappi, ið gjørdi, at hann bleiv settur - ein smádrongur, sum spældi inni í honum, slepti bremsuni, og bilurin fór á rull og rendi á ein garð. Drongurin fekk einki mein, men, gronin á Buickinun fór í knús. Hetta hendi fyrst í fimmtiárunum. Bilurin stóð nøkur ár eftir hetta inni í havagarðinun hjá pápa Hjarvil, Løðu Jógvani, keypmanni.

Í 1945 seldu »Norðustovumenn« Austinin til Thorstein Jørgensen í Sørvági. Thorstein hevði hann heldur ikki leingi, tí longu í 1948 selur hann bilin til Pola Jacobsen - »Oyra Pola«, í Miðvági. Tá í 48 mundi tað besta vera farið av hesum annars stásiliga bili, ið hevði sóltak, t. d. riggaðu bremsurnar stak illa, og bleiv hann sostatt eyknevndur »Bremsi-Gina«.

Tá á døgum var vanligt at yrkja tátt um bæði fólk og deyðar lutir, og »Gina« fekk sín tátt. Her er hvat okkurt ókent skald yrkti um hana:

*Bremsi Gina, Bremsi Gina.*  
*hvussi bremsar tú?*  
*Bremsar tú ein metur*  
*verri verður í vetur!*  
*Bremsi Gina, Bremsi Gina.*  
*hvussi bremsar tú?*

Oyra-Poli, ið er føddur í 1918, hevur greitt mær frá, at hann bant ein snørisstubba á fótbremsupedalina og togaði hana uppfráaftur - hon læsti seg hvørju ferð, hann hevði traðkað á hana!

Fyrst í fimmtiárunum seldi Poli »Ginu« til Jørgen Johannesen í Sandavági, ið gjørdi hana um til lastbil, og um somu tíð fær Poli sær ein lastbil sjálvur - ein Dennis lastbil av teimun, onglendingar høvðu við til landið undir krígnum. Poli koyrdi við Dennisbilinun, til 1957 tá, hann var so óheppin at koyra útav í hálku áraka Hjalmarsa pakkhús Úti á Bakka í Sandavági. Poli megnaði at bólta sær úr stýrhúsinun áðrenn bilurin fór útav og boltaði runt. Einki setur var í førarahúsinun - Poli sat á einum tómun ølkassa. Eftir óhappið lá bæði ølkassi og førarahús í smildri uppi á laduni. Bilurin varð vorðin vrak og bleiv seinni brúktur sum eykalutir. Hendingin fór fram í februar 57, og Poli sigur frá einum duldarfullum fyribrigdi í sambandi við óhappið: Dótturin vildi sleppa við í bilin henda dagin, men Poli vildi ikki loyva henni við, hetta tí, at hann kvøldið fyri hevði droymt, at hann fór at koyra útav. Óhappið hendi neyvt á sama stað, ið hann hevði droymt, tað fór at henda! Ja mangt er millum himmal og jørð!



*Her sæst Chevroleturin koyra eftir »Blindtarminun« í Sørvági - tá á døgum var hesin vegur bert ein moldgøta*

Vit koma nú til triða bilin, íð Skarpheidin flutti heim úr Onglandi tá í 42. Hesin var ein lítil Morris 8, hann hevði tvær huðrar, var grønur á liti, hevði fýrasylindraðan motor, trý framgangandi gear pluss bakgearið, og hjólini vóru við egarum - sá ikki sørt sporty út. Bilurin kom at verða róptur »Goggan«.

Nevnast kann, at Norðurstovumenn í 1947 fingu trolaran »Vesturskin«, ið á bognun hevði VA 221 - neyvt somu tøl, sum stóðu á nummarplátuni á Gogguni! Norðurstovumenn seldu Gogguna við krígslok til Hans Nikláa við Gil, kommunuskrivara. Nú var tað so, at Hans Klái var hávaksin, førligur maður - serliga beinini vóru long - og Goggan var tronglig innan, sostatt gjørdist neyðugt at flyta førasetrið heilt aftur móti baksetrinun. Rattið var høgrumegin. Arbeiðið at flyta setrið gjørdu Leon Heinesen og Thorstein Jørgensen í smiðjuni millum Skipáirnar, so nú bar til hjá Hans Kláa at kroysta seg inn bak rattið - men, hann sat við knøunum nærum heilt uppiundir takinun!

Jens Rasmussen - Jens hjá Vika Liasi, átók sær at læra Hans Kláa at koyra bilin. Frálæran fór fram inni á flogvøllinun, ið nú eftir kríggið ikki longur var í nýtslu, og eftir nakrar dagar við intensivari frálæru mettu teir báðir, at tíðin varð búgvin at fara »jomfrútúrin« við Hans Kláa bak rattið. Ferðin gekk til Miðvágs.

Teir komu yvur um Vatn uttan nakrar trupulleikar, men á veg útaftur til Sørvágs mundi enda galið! Við Leitisrætt var rulliportur og portur at lata upp og aftur eftir sær. Jens fer úr fyri at lata portrið upp, meðan hann fæst við hetta, kemur Goggan strúkandi beint á kroppin á honum! Tað eyðnast honum at loypa til viks, bilurin fer framvið honum í »hoppigeari« og stegðar eitt petti hinumegin portrið. Jens rennur til bilin og skrykkjur hurðina upp.

– Hann reyk avstað av sær sjálvum!, grælar í einum skelkaðum Hans Kláa. Tað sum var hent var, at hann hevði slept hondbremsu og kobling og ikki havt fótbremsuna niðri, meðan bilurin stóð í fyrsta kervi.

Men sum fráleið gjørdist Hans Klái ein vandur bilførari og koyrdi við Gogguni til einaferð fyrst í 1948,tá seldi hann hana til Jógvan Hans Joensen í Miðvági. Eg og mínir javnaldrar minnast so dánt Gogguna, meðan Hans Klái við Gil átti hana.

Goggan kom nøkur ár eftir kríggið at standa niðri í íshúsinum í Vatnsoyrum - tað er tað seinasta eg havið hoyrt um hana.

Ein Morris Eigth bilur, neyvt sama slag sum Goggan, hesin seinni bleiv róptur »Krákan«, var í Sandavági. Um Krákuna er at siga: Hon var svørt á liti. Eivind Rasmussen - Eivind í Bartalsstovu - í Sandavági keypti hana fyrst í fimmtiárunum frá Hjarvil Rasmussen, ið skuldi hava fingið hana úr Onglandi eftir krígslok. Eivind seldi hana, tá fimmtiárini vóru hálvrunnin, til Frits Joensen - Frits á Dunga - í Sandavági. Tá bilurin bleiv settur í 1963 keypti Eyðum Thomasen í Sørvági motorin og nýtti hann í einum krana á bryggjuni í Borgshavn í Grønlandi, hetta var í 1964. meðan Eyðun róði út í Grønlandi.



*Buickurin hjá Hjarvil Rasmussen*

P/f N. Niclasen fingu eftir kríggið ein Pachard persónbil úr Danmark. Dánjal Niclasen keypti hann frá onkrum ríkmanni niðri. Bilurin hevði eingi hjól, tá hann kom til landið.

Henry Davidsen plagdi at koyra leigutúrar við Packhardinun. Bilurin var inni í myndini fyrstu Vestanstevnina, hon var í 1946. Hendan stevnan bleiv hildin við Leitisvatn einastu ferð hon hevur verið hildin har, m. a. virksemi bleiv róð kap á vatninun og kapríðing fór fram á vegnum fram við vatninun - Pachardurin koyrdi fólk til og frá stevnuøkinun. Somuleiðis koyrdi Buickurin hjá Hjarvil í pendulfart.

*framhald*



